Umfatandi herverk í Ósaskúlanum

Bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið hava fólk verið inni í Ósaskúlanum og tømt pulvursløkkjarar. Mánamorgunin var skúlin stongdur vegna upprudding

HERVERK
Stefan í Skorini

Ikki einaferð men heilar tvær ferðir hetta vikuskiftið hava fólk framt umfatandi herverk í Ósaskúlanum í Klaksvík. Skaðarnir fara helst at kosta meira enn 100.000 krónur.

Fríggjakvøldið hendi tað fyrru ferð. Ein maður kemur inn í skúlan um seks tíðina og tømir ein pulversløkkjara í samkomuhøllini. Fólk var til staðar og boðaðu løgregluni frá. Maðurin, sum var ávirkaður av alkoholi, meldaði seg sjálvan til løgregluna ein tíma seinni.

Konsert við kórtónleiki skuldi vera í Ósaskúlanum hetta kvøldið, men hon varð síðani flutt í býráðshúsið.

Leygardagin fóru fólk at rudda og vaska, og sýnsmaðurin metti hendan fyrra skaðan til 30-50.000 krónur.

Umaftur

Uppruddingararbeiðið var liðugt leygarkvøldið, men sunnumorgunin varnaðust fólk, at rúturin í úthurðini var brotin, og tað vísti seg aftur nú, at onkur hevði verið inni og tømt triggjar eldsløkkjarar. Tað var ikki ein tespilig sjón.

Pulvurið frá eldsløkkjarunum fer ímillum allastaðni, og tað er torført at rudda uppaftur.

Seinnuferð var herverkið meira umfatandi. Gerningsmaðurin hevur verið inni í fleiri stovum og sprænt við pulvuri. Tveir eldsløkkjarar á sjey kilo eru tømdir í skúlanum. Síðani er viðkomandi farin inn í sethúsini beint norðanfyri skúlan, har 10. flokkur heldur til, og tømt enn ein eldsløkkjara.

Á berum

Løgreglan í Klaksvík sigur, at hon stendur so at siga á berum í hesum málinum. Tað einasta hon veit er, at herverkið er framt, eftir at fólk eru liðug at vaska leygarkvøldið, tí eingin varnaðist tað fyrr enn sunnumorgun.

Løgreglan heitir tí á fólk, sum møguliga hava sæð okkurt illgrunavert um hesar leiðir leygarkvøldið ella sunnunáttina, um at venda sær til støðina.

Mánamorgunin fóru fólk aftur at rudda upp eftir herverkið, og skúlin var stongdur.

Símin Petur Hjelm, skúlastjóri í Ósaskúlanum, er sjálvandi øgvuliga harmur um hendingarnar og sigur, at skúlin møguliga ikki letur uppaftur fyrr enn mikudagin.

Umfatandi herverk varð framt í Ósaskúlanum um vikuskiftið. Pulvurið sæst á gólvinum. Tað fer ímillum allastaðni og er torført at rudda uppaftur. Skaðarnir fara helst at kosta meira enn 100.000 krónur

Mynd: Jan Müller

Meðan tann eini gerningsmaðurin er kendur, hevur løgreglan enn onga ábending um, hvør hevur verið uppá spæl sunnunáttina

Mynd: Jan Müller

53 ára gamal funnin deyður

Ein bóndi á Sandi kom seinnapartin hósdagin fram á lívleysan mann, sum eftir øllum at døma er dottin oman. Rúsdrekka er helst orsøkin til deyðsfallið

VANLUKKA
Stefan í Skorini

Mikudagin fóru triggir mans til gongu av Líðarenda og norðureftir Traðarhamri á Sandoynni. Ætlanin var at ganga til Skopunar. Túrurin endaði tó við einum sorgarleiki, tí bara tveir vunnu upp hús á lívi.

Løgreglan á Sandi upplýsir, at hinir báðir menninir komu aftur til hvør sína bygd. Tann eini kom til Skopunar fyri skýming, og hin kom til ein bóndagarð á Sandi í skýmingini og bað um at vera koyrdur heim. Eingin í teirra segði nakað um tann triðja mannin, sum enn ikki var komin til hús.

Hósdagin klokkan 14 fann ein bóndi á Sandi tann triðja mannin, sum lá inni í Dal omanfyri Meginskúlan. Sambært kanningunum hjá løgregluni er maðurin dottin oman av tí seinasta klettinum, tá hann hevur roynt at koma oman gjøgnum hamaran. Fallið er fýra metrar, og síðani er maðurin bóltaður einar 50 metrar oman ígjøgnum líðina.

Løgreglan heldur, at maðurin er deyður á staðnum. Hann var 53 ára gamal og búði í Skopun.

Lítil ivi er um, rúsdrekka er orsøkin til vanlukkuna. Allir triggir menninir vóru ávirkaðir, tá teir fóru avstað, og teir høvdu eisini rúsandi løg við sær. Hinir báðir, sum komu aftur, hava lítið at siga løgregluni, tí teir minnast ikki alt, sum fór fram.

Fjølbroytt konsert í Runavík

Í annaðkvøld skipar Mentanarhúsfelagið í Runavík fyri konsert við kórsangi og klassiskum tónleiki, sum klaksvíkingar fara at framføra

KONSERT

Í annaðkvøld klokkan 20.00 fara 17 Sangarar úr Klaksvík saman við kvinnukórinum Suð og tónleikarunum Moniku Stauss Joensen og Helgu Gerðalíð at hava konsert í Runavíkar Skúla.

Konsertin í Runavík er liður í fyrireikingunum hjá klaksvíkingunum í sambandi við Íslandsferð. Tað vil siga, at kvinnukórið Suð fer ikki við til Íslands.

Dýra biðidag, sum er fríggjadagin, fara 17 Sangarar og tær báðar tónleikakvinnurnar til Íslands, har vitjað verður á Akranesi og í Kópavogi. Ein konsert verður í hvørjum bænum.

Tær báðar, Monika Stauss Joensen, sum er ættað úr Schweits, og Helga Gerðalíð, sum er úr Íslandi, eru millum kendu tónleikarar okkara, og hava verið víða á konsertferðum. Tær leika ávikavist á fiól og klaver.

Teir 17 Sangararnir úr Klaksvík hava eisini fleiri ferðir áður verið utanlands á konsertferð, eins og tey hava havt heilt nøgvar framførslur í Føroyum. Regluliga eru tey eisini at hoyra í Útvarpinum her.

Kvinnukórið Suð er nýggjari kór, sum tó hevur verið at hoyrt bæði í útvarpi og sjónvarpi her heima. Um páskirnar vóru tær at síggja í SvF.

Tað er Jógvan við Keldu, sum stjórnar teimum 17 Sangarunum, og Steinvør Fonn plagar at stjórna kvinnuskórinum Suð.

Á konsertini í Runavíkar skúla í annaðkvøld fara tey at framføra tað, tey hava vant í vetur, og ivaleyst verður íslandsskráin eisini at hoyra.

Atgongumerkini til konsertina kosta kr, 50,- og verða at fáa við dyrnar.

ej

Rokk-o-Rudl í Norðurlandahúsinum

Sitikonsertin í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið var ein misjøvn uppliving. Til tíðir megafeit, men eisini tóm og lítið sigandi.

UMMÆLI
Sveinur Dam

Krit góvu sínum áhoyrarum eina frálíka heilsan, nú teir ætla sær at halda ein longri steðg.

Mynd: Ingi Rasmussen

Tað fyrsta, ið eg legði til merkis, tá eg trein inn í stóra salin í Norðurlandahúsinum, var ljósið. Tað var náttarblátt, og gav rúminum ein serstakan dám. Minti, av einari ella aðrari orsøk, um Grøna tjaldið á Roskilde. Dempaður tónleikur fjálgaði rúmið og undirstrikaði, at talan var um eina rockkonsert. Sitikonsert, væl at merkja. Ikki tí. Sitikonsertir eru sum oftast feitar, um tónleikurin er verdur at hoyra. Tað var hesin í stóran mun, hóast okkurt keðiligt eisini var skránni.

Stóri salurin í Norðurlandahúsinum var nærum á tremur av áhoyrarum, til stóra rockbrakið leygarkvøldið, sum var ein partur av hátíðarhaldinum, nú húsið hevur 20 ár á bakið.

Sveimandi Gestir

Prix Føroyar vinnararnir Gestir løgdu út, við teirra sermerkta stemningsfulla tónleiki. Hevði ikki stórar vónir til teir frammanundan konsertini, av tí at teir rætt og slætt ikki hava fangað meg fyrr. Men eg má viðganga, at eg gjørdist sera positivt yvirraskaður, og varð nærum sligin út av løgunum, teir borðreiddu við. Ein av orsøkunum til hetta var óivað, at ongir hooligans vóru í salinum, og gjørdi hetta upplivingina meira fullfíggjaða. Í staðin fyri ein bunka av hoppandi reyðum t-shirtum, bar nú til at konsentrerað seg um tónleikin, eitt, sum var torført til Prix Føroyar finaluna.

Niðurstøðan var greið beinan vegin teir byrjaðu: Teir eru feitir. Spældu super væl og gjøgnumført, við nøgvum lekrum detaljum. Og slíkar hava tað altíð best á sitikonsertum, tí áhoyrarin fangar tær lættari, tá tað ikki eru hoppandi fólk og larmur rundan um.

Tungir dreingir úr Klaksvík

Eftir at Gestir høvdu lovað áhoyrarunum at vera gestir í tónleikaheimi teirra í ein góðan hálvan tíma, trein numetal bólkurin Mind's Eye, úr Klaksvík á pallin. Var spentur at hoyra teir, tí eg hevði hoyrt nøgv gott um teir, men bleiv heldur vónsvikin. Við ov nøgvum íblástri frá KoRn, spældu teir mainstream nu-metal tónleik, sum ikki hóskaði serliga væl til eina sitikonsert. Har var snøgt sagt ikki nóg nøgv góðs í tónleikinum, til at hann bleiv áhugaverdur. Eisini vóru teir, undantikið sangaran, sera passivir á pallinum, stóðu mest sum bert á sama stað alla tíðina.

Tó skal sigast, at bólkurin ivaleyst hevði verið feitur, til eina vanliga standikonsert, har mann kundi flippa út, uttan at noyðast at lurta so væl eftir tónleikaheildini.

Makrel stinkar ikki

Aftan á Mind's Eye, áttu Makrel pallin. Hetta var tann bólkurin, sum eg við spenningi hevði bíðað eftir, og teir skuffaðu heldur ikki. Løgdu út við Betty, ið er fyrsta lagið á nýggju fløguni Makrel Stinkar. Feitur sangur, sum teir spældu sera væl. Eftir hendan sangin hildu teir fram við løgum, ið mintu meg á nøvn sum eitt nú Nirvana, Sepultura, Staind, U2 og Incubus. Serliga riggaði seinasti sangurin hjá teimum, Sangur til 200, væl, tá Ári Rouch fór syngjandi niðan millum áhoyrararnar.

Makrel eru avgjørt ein av feitastu live bólkunum í Føroyum í dag. At teir trívast á pallinum er eyðsýnt, og alt sær so leikandi lætt út hjá teimum. Teir levera undirhald fyri allar pengarnar, serliga Ári Rouch, sum umframt at duga at syngja, eisini er ein framúr skemtari.

Farvæl til Krit

Havnabólkurin Krit hevur altíð havt sín egna stíl. Teir spæla grótharðan tungan rock, í spennir sera vítt, líka frá Death Metal, yvir til meira melodiøsan metal tónleik.

Ein kundi fryktað, at hetta fór als ikki at rigga til eina sitikonsert, men aftur her bleiv eg tikin á bóli. Teir vóru snøgt sagt framúrskarandi. Gjøgnumførdur og væl spældur tónleikur, gott show, eitt image, ið ímyndar tónleikin og so duga teir óvanliga væl at fáa stemningin upp at kóka.

Málaðir í andlitinum og í løgnum klæðum, komu teir á pallin at spæla vælkenda mega tunga, larmandi tónleikin. Eftir at hava brøla og rópt seg gjøgnum eina skrá, ið fevndi um alt frá speed metal til melodiøsan kirkjulíknandi tónleik, kom tað veruliga hæddarpunktið ímóti endanum. Í svørtum kyrtli stóð Edmund í Garði á odda fyri tí mest agressiva og intensa, ið eg nakrantíð havi sæð í Føroyum. Hann spældi violinboga á guitaran, sum gav eitt ræðuligt, nærmast óhugnaligt óljóð. Sló, kastaði og sparkaði guitarin, fyri at enda at slíta streingirnar av honum og taka ein annan guitara í hond. Alt meðan hinir í bólkinum bulderaðu ófantaliga illa.

Eftir hetta hendi nakað løgið. Teir førkaðu seg úr larminum og ruðuleikanum, inn í eitt reindyrkað popp stykki, ið allarmest líktist onkrum hjá U2. Endaspurturin var, tá Edmund við eitt fór at spæla eitt Wagner-líknandi gravarferðalag á urguna.

Um showið til endans var jarðarferðin hjá Krit, veit eg ikki, tí sambært Edmundi, ætla teir sær at hava ein longri steðg. So um tú ikki sást teir leygarkvøldið, misti tú eina av teimum størstu konsert upplivingunum nakrantíð í Føroyum.

Tungmálmur úr høvuðsstaðnum

Seinast eg var til sitikonsert hjá Hatespeech, var tá Tutl fylti 25 ár, eisini í Norðurlandahúsinum. Ta ferðina var eg málleysur, tí teir vóru so vemmiliga feitir og nýskapandi. Fullir í orku.

Av tí sama hevði eg stórar vónir leygarkvøldið, men eg bleiv nakað vónsvikin. Ikki tí, Hatespeech vóru fínir, men teir høvdu onki nýtt at bjóða. Og tá mann hevur hoyrt teir nakrar ferðir, so verða teir forútsigiligir og harvið eisini keðiligir, serliga tá mann er noyddur at sita niðri og lurta. Einasta, sum eg leggi til merkis hvørjaferð eg hoyri Hatespeech, er guitarspælið hjá Heðin Ziska Davidsen. Tað er genialt, og lyftir heildina í bólkinum nógv upp, tí har er allatíðina okkurt nýtt og spennandi at hoyra.

Blandaðar kenslur

Ímillum hvørt av innsløgunum hoyrdist sera áhugaverda orkestrið Aparat, úr Íslandi. Sum skilst verður hetta eitt av tilboðunum á Listastevnuni í august, so tað gleði eg meg longu til. Tað var við blandaðum kenslum, eg fór heim eftir tiltakið. Okkurt í mær segði "WOW," meðan okkurt annað segði "Geisp-Zzz." Har var nógv, sum var ordiliga feitt, og hóast alt ikki var líka gott, so er tað tað feita, ið situr klárast eftir í minninum. Og tað verður nokk sitandi eina løtu.

Í øllum førum fer framførslan hjá Krit nokk altíð at teljast millum tær bestu, ið eg havi verið til yvirhøvur. Keðiligt, at teir fara at hava ein steðg, tí tað er avgjørt ein bólkur, sum er verdur bæði at hoyra og síggja.

Eisini fari eg ivaleyst at minnast framførsluna hjá Gestum, tí hon opnaði eygu míni fyri einum sera góðum bólki, ið heilt sikkurt er millum teir bestu her í Føroyum.

Makrel fari eg at minnast, bara tí teir eru Makrel. Ongin er sum teir, og teir eru feitir allan vegin ígjøgnum.

Trúgvi ikki at Hatespeech og Mind's Eye komu til sín rætt, av tí, at tað var ein sitikonsert, og áhoyrararnir í stóran mun vóru edrúir og friðarligir. Hopi at sleppa at síggja onkran av hesum báðum bólkunum aftur skjótt. Kanska ólavsøkukonsertin hevði verið eitt gott høvi at víst, hvør dugur er í teimum.

Vóni at skipað verður fyri fleiri líknandi tiltøkum í framtíðini, tí slík tiltøk geva bólkunum ein góðan møguleika at vísa, hvat teir hava at bjóða reint tónlistarliga.

Razz í Føroyum

Danska barnastjørnan Razz var í Føroyum um vikuskiftið. Hann kom til landið úr Danmark sunnudagin, og hann búði á Hotel Vágum á stuttu vitjanini.

Hann hevði tvær framførslur - eina í Platform í Havn og eina í Mentunarhúsinum í Fuglafirði.

Ætlanin var, at Razz skuldi koma til landið nakað herfyri, men vegna sjúku noyddist hann at avlýsa, men hann kom so og hevði tvær framførslur.

Razz gjørdist kendur, tá hann vann barna Melodi Grand Prix í 2002.

-HR

Razz búði á Hotel Vágum, meðan hann var í Føroyum. Talan var kortini um ein stuttan steðg